# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Magnus á Teigunum farin



Magnus Madsen var føddur 8. oktober 1918 á Teigunum á Sandi og var sostatt út ímóti teimum 87 árunum, nú lívstráðurin slitnaði hósdagin 15. september, tveir dagar eftir, at hann hevði fingið eina heilabløðing. Foreldur hansara vóru Maria á Teigunum og Jóan Petur Madsen, skipari úr Kvívík, ið búsettist á Sandi. Magnus var elstur av seks systkjunum, ið komu til, og tíðliga vísti hann stak góð evnir til tað bókliga. Hann var tí sendur til Havnar sum 10 ára gamal at ganga í millum- og realskúla. Eftir at hava fingið realprógv fór hann á sumri 1935 til Danmarkar og tók studentsprógv í Sorø í 1938. Hann fór tá at lesa til kemiverkfrøðing, men um mánaðarskiftið februar-mars árið eftir fekk hann tey tungu boð, at pápin var deyður av tuberklum. Hetta var ein ógvisligur smeitur fyri Magnus, men hann gavst ikki á hondum, hóast peningaligi stuðulin heimanífrá helst steðgaði upp. Hann helt á og fekk lestrastuðul eina avmarkaða tíð, og við ótrúligum seiggi arbeiddi hann dúgliga við lestrinum og var liðugur longu í 1943.

Hann fekk starv við "H.C. Ørsted Værket" og var har í eini 2-3 ár, men fór so í starv hjá "Rockwoolkoncernini", ið framleiðir bjálvingartilfar. Í 1947 var hann nakrar mánaðir í Føroyum og royndi at fáa starv her, men einki spurdist burtur úr. Niður aftur komin fekk hann starv hjá "Hanias", men tey seinastu nógvu arbeiðsárini vóru hjá "Dansk Brandværnskomite". Tá ferðaðist hann runt alt Danmark og kannaði um bjálvingar vóru sum tær skuldu. Tær ábøtur, sum institutti mælti til, vórðu gjørdar, tí tryggingarfeløgini kravdu tað.

Magnus hevði stóran tokka til føðilandið, og var sera virkin í Føroyingafelagnum í Keypmannahavn, og tá ið hann fór frá fyri aldur, gekk leiðin heim aftur. Hetta var í 1983. Í Hoydølum høvdu teir trupulleikar við at fáa lærarakreftur tá, so boð vóru eftir Magnusi at koma at hjálpa. Har undirvísti hann so sum vikarur í hálvt ár, til lærari fekst.

Magnus giftist undir krígnum við Kirsten, ið var donsk, og tey fingu tveir synir, Óla Bjørn og Niels Petur. Eg kann minnast, tá ið eldri drongurin Óli Bjørn á fyrsta sinni kom til Sands, hann mundi vera eini 6-7 ára gamal. Vit undraðust hvussu væl hesin smádrongur dugdi at tosa føroyskt. Tað hevði pápi hansara lært hann.

Í 1961 komu Magnus og Bergljót Hátún saman, og tey giftust. Tey fingu trý børn, Anniku, Jóannes og Turid.

Magnus hevur verið ein virkin maður alt sítt lív eisini sum pensjónistur. Var nakað tiltak í miðbýnum í Havn, so sá tú sum oftast Bergljót og Magnus, ja, tey vóru ein býarmynd. Tað er ikki av tilvild, at tey eru fremst í permumyndini á bókini "Aftur og fram 91/92" hjá Finnboga Ísaksoni sála. Í Tilhaldinum í gamla Føroya Banka vóru tey fastir luttakarar, og sjálvt á útoyggjastevnuni í Svínoy í summar vóru tey við. Á ólavsøku sóu vit tey á sjónvarpsskugganum greiða frá myndaframsýning í Tilhaldinum. Eisini sást tú tey stuðla, tá ið tey samkyndu savnaðust í miðbýnum fyri fáum vikum síðani

Hóast Magnus bert var 10 ára gamal, tá ið hann flutti av Sandi, hevði heimbygdin hansara stóra tokka, og tað fór neyvan nakar til gravar har, uttan at tey vóru til jarðarferðina. Pápi hansara keypti gomlu handilshúsini á Grótteigum, tá ið handilsvirkið hjá Rasmusi í Koytu fór av knóranum í 1925. Húsini vórðu seinri tikin niður, og tá ið systkini lutaðu eigindómin á Teigunum sundur, skipaði Magnus fyri, at honum lutaðist handilsgrundstykkið á Grótteigum, og tað liggur dygst uppat "Aksalsahandli" hjá Sands Bygdarsavni. Í summar handaði hann bygdarsavninum tinglýst skeyti uppá hetta grundstykki, ókeypis.

Magnus er farin, ein vitandi maður, ið visti so nógv at práta um, og saknurin er stórur hjá teimum mongu, yngri sum eldri, ið kendu hann. Men størstur er saknurin hjá tær Bergljót og børnum og abbabørnum. Tað gleddi hann nógv, at felags fotomynd varð tikin í summar av tykkum øllum.

Mátti hann, ið øllum valdar, styrkt tykkum í sorgini og saknin-um.

**Ólavur Clementsen**

## Til minnis um
## Jónu Andreasen



Nú Jóna er farin, renna tankar fram fyri meg, eg sum altíð var so vælkomin í tykkara fyrimindarliga heim, altíð við einum góðum orði, aldrin eitt øvugt orð at hoyra frá tær Jónu, altíð so positiv, spurdi hvussu gekk, hvar eg sigldi, og hvussu mamma hevði tað. Tú segði mær altíð frá tínum børnum, sum tú var so góð við og ynskti alt tað besta.

Mangt prátið høvdu vit tvørtur um garðin, tá tú var á snórinum og eg í túninum, ella tá eg møtti tær, altíð so smílandi onkustaðni í býnum.

Manga góða løtu sótu eg og Pól Jóhan og eisini Sigrid í tykkara heimi, ið eg seint komi at gloyma. Eisini eru eg og dóttir tín Annefía javngomul.

Saknurin man vera stórur hjá tykkum Hans Jakup, Sigrid, Pól Jóhan, Andreas, Annefía og Maria. Ein stórur uggi er, at Jesus sigur: Sæl eru tey hjartareinu, tí at tey skulu síggja Guð. Ærað veri minni um Jónu.

**Alex**

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Hemming Petersen, Klaksvík**, fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi mikudagin klokkan 18.

Jarðarferðin verður hósdagin klokkan 13 úr Betesda.

Tey, ið ynskja at lata blómur ella krans kunnu í staðin lata Kristnastovu eina pengingagávu. Konto í pengastovnunum.

**Páll Petersen, úti á Boðaneshamri í Havn**, fer til gravar úr Havnar Kirkju í morgin, mikudagin, klokkan 14.

**Engelbreth Hansen** fer til gravar úr Fuglafjarðar kirkju í morgin, hósdagin, klokkan 14.

## Dagurin

**22. september. Mauritius**, deyður umleið ár 300. Rómverskur herhøvdingi, sum saman við 6666 hermonnum í liði sínum (tebanska lógin), ið allir vóru kristnir, varð tikin av døgum.

Navnið merkir *blámaður.*





**Fært tú ikki tikið teg saman?**

Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í samband við minningarorð.

Sosialurin
"Nøvn í vikuni"
Tel.341800 / 216135
Teldupost: maggi@sosialurin.fo

Nøvn í vikuni

**Kennir tú onkran …**



Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.

Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsing… "Nøvn í vikuni", so t… persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so t… restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um m… … vit góðar journalistar og fotografar til slíkar uppgáv…